# Álendingar innflyta prixið



*Ulrika Lind er samskipari av álendsku útgávuni at Prix Føroyum*

**Prix Føroyar er so fyrimyndarligt, at tað kendist álendingar nú ætla sær, at skapa sína útgávu, ið tey vóna fer at hava líka stóran týdning fyri teirra mentan, sum Prix Føroyar hevur havt fyri Føroyar**

TÓNLEIKAKAPPING
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Tá Nordens Institutt saman við álendsku landspartastjørnini, býráðnum í Mariehamn og felagskapinum fyri ung í Álandi tóku stig til, at nú skuldi okkurt gerast fyri at menna rútmiska tónleikin í Álandi, var náttúrligt at hyggja at Prix Føroyum. Royndirnar sum Norðurlandahúsið hevur gjørt við Prix Føroyum, eru kendar í norðurlendskum høpi. Ein arbeiðsbólkur varð tí settur at skipa fyri tiltakinum, og Ulrika Lind, sum hóast sín unga aldur hevur nógvar royndir í norðurlendska samstarvinum, varð sett sum samskipari.

Hon hevur í hesið vikuni verið í Føroyum og tosað við m.o. Fróða Vestergaard um tiltakið. Hon hevur sæð videobondini av Prix Føroyum 2001 og 2003, og tosað við onkran luttakara, og hevur fingið sera nógvan íblástur. »Prix Føroyar er jú sera imponerandi«, sigur Ulrika Lind.

### Ymisk tónleikaumhvørvi

Hon heldur tó ikki, at tað ber til at kopiera tiltakið beinleiðis, onkrar broytingar mugu gerast, tí føroyski og álendski tónleikapallurin eru ikki líka. Í Álandi búgva 26.000 fólk, og umleið 5 fløgur av svingandi góðsku koma út um árið. Hetta er væl minnið enn í Føroyum. Eingi spælistøð eru heldur í Álandi, og hetta ger, at tað verður trupult at skipa fyri tiltakinum. Men hetta verður væntandi loyst, við at seta ein uttandura pall upp. Hon væntar at eini 2-3 innleiðandi umfør verða.

Men tey spæla við tankanum, um at skipa fyri tónleika verkstøðum, har bólkar og einstaklingar verða vegleiddir og fáa lagt lag á framførslu og annað, og at nakrir bólkar síðan verða valdir út at luttaka. Men enn er einki fastlagt. Tiltakið verður skapt í støðugum dialogi við tónleikaumhvørvið í Álandi.

### Samstarv er møguligt

Ulrika sigur, at ætlanin er at fara undir tiltakið í aprílmei. Hon hevur tí skund við at fyrireika. Ein av fyrstu avgerunum, ið tey skulu taka er viðvíkjandi vinningum. Her kundi hon hugsað sær, at vinnandi bólkurin eins og í Prix Føroyum vann tíð í upptøkuhøli t.d. í Føroyum. Eisini hevði verið áhugavert, at skipað fyri samstarvi, soleiðis at føroyski Prix vinnarin spældi í Álandi, og álendski vinnarin spældi í Føroyum ella enntá, at báðir vinnandi bólkar fóru á tónleikaferð saman. Møguleikarnir eru nógvir, eitt nú kann samstarv gerast við føroyskar festivalar, um at luttaka við dómarum og møguliga bjóða einum finalubólki á sín festival.

### Óstøðugt sjónvarp

Ætlanin er at senda tiltakið í sjónvarpi. Men her eru trupulleikarnir nokkso størir, ein álendsk sjónvarpsstøð er, men hendan sendir bert av og á, tí eru fólk ikki von at hyggja eftir henni. Í Álandi tosa fólk svenskt og tí hyggja tey, mest eftir svenskum og finsk/svenskum sjónvarpi. Álendska sjónvarpsstøðin hevur als ikki neyðuga førleikan ella útgerðina til at framleiða eina tílíka sending, og tí verður støðin noydd at leiga fólk og útgerð uttanifrá. Men Ulrika er sannførd um, at hetta nokk skal lukkast.

### Útlendsk nøvn og útlendskir pallar

Tað finnast professionellir álendskir tónleikarar, men teir eru ikki búsitandi í Álandi, flest allir flyta antin til Finnlands ella Svøríkis har møguleikarnir at liva av tónleiki eru størri. Eisini hevur Áland fleiri góðar tónleikafestivalar, men hesir hava næstan bara luttøku av bólkum úr útlandinum, t.d. svenskir og finskir bólkar, og nógvir av áskoðarunum eru ferðafólk

### Ætlar at menna tónleikapallin

Men nógvir ungir bólkar eru eisini, og her er nógv potentiali. Henda verkætlan er ein roynd at menna hetta potentialið. Hetta kann eisini vera við til, at gera vart við álendskan tónleik uttanlanda. Hon sigur, at sum er, hava hesir ungu bólkar ongar avbjóðingar, og teir eru svangir eftir, at okkurt skal henda. Tí er hetta í tøkum tíma, at tey eru farin undir at fyriskipa hesa avbjóðin. Ulrika sigur seg vera glaða fyri at sleppa at samskipa hetta tiltakið, og sostatt fáa møguleika at gera okkurt, sum stuðlar mentanarlívinum í Álandi.

Hon greiður frá, at hetta brýtur frá nógvum av teimum tiltøkum, sum vanliga verða fyriskipaði í norðurlendskum høpi. Ofta eru góðskukrøvini so høg, at tað av sær sjálvum gerst hámentan, og missir sambandið við mentanarumhvørvið, sum tildømis Prix Føroyar umboðar. Tí er tað stuttligt at sleppa at arbeiða við tílíkum sum hesum.

Ulrika sigur, at hon vónar, at kappingin í Álandi kann fáa líka stóran týdning fyri álendska tónleikalívið, sum Prix Føroyar hevur havt fyri tað føroyska.

### Ætlar sær aftur til Føroyar

Hon væntar, at tá tey um stutta tíð hava funnið røttu karmarnar fyri tiltakið, og fingið seinastu fíggingina upp á pláss, kemur hon aftur til Føroyar á nýggja kanningarferð. Fyribils fíggja álendska heimastýrið, býraðið í Marieham, og Nordens Institut tiltakið. Men ætlanin er at finna nakrar aðrar stuðlar, soleiðis at fíggjarkarmurin verður í minsta lagi 100.000 evrur.

## Ymiskt

**REYÐI KROSSUR FØROYA/**
Keypssamtøkurnar. Saman við klæðnainnsavnan leygardagin 29. oktober 2005 kl. 10.00-14.00 taka vit eisini ímóti óslitnum skóm og øðrum smálutum (kanska jólalutum?) til loppumarknað, bókum og tilfari »til klútar« úr bummull.
*Reyði Krossur Føroya*

**HARUHAGI**
Rætturin at skjóta harur, í 2005, í ognarhaganum Fyri uttan Hús, Syðrugøta, verður lýstur til sølu fyri hægsta boð omanfyri kr. 3000,- Boðini, sum skulu verða skrivlig, skulu vera inni hjá Óla Joensen, 513 Syðrugøta, í seinasta lagi hósdagin, 27. oktober, kl. 20:00.
*Hagastýri*

**SPARKARI**
Er tað nakar ið eigur ein gamlan sparkara at selja okkum?
*Tlf. 353535 ella 213535*

**KAJAK TIL SØLU**
Gul kajak úr plasti, sera skjóttgangandi. Longd 5,2 m. Pagaj, spraydeck og jakki fylgir við. Prísuppskot: 9.500 kr.
*Tlf. 522288*

**BASARUR**
verður í Samkomuhúsinum sunnudagin 6. november. Tey, ið ynskja at lata onkran lut til Basarin kunnu lata hann til nevndarlimirnar.
*Sumbiar Ítróttarfelag*

**TIL SØLU**
2 garaguhurðar, cd-Crawford h. 2,25 x b. 2,20 og h. 2,00 x b. 2,20. Prísur kr. 2.500 hvør.
*Tlf. 282100*

**TIL SØLU**
Ein grindaknívur normal stødd og ein lítil grindaknívur til sølu.
*Tlf. 251863*

**TIL SØLU**
Tekningar av »Norðvíkingi« við spantris tekning og samba viður kr. 1.000,-
*Tlf. 259233*

**SMÁBÁTADEILIR**
fendarar, bátarútar og ymiskir eykalutir og ymisk filtur til ymisk motormerki er enn at fáa í Rættará.
*Tlf. 313484 219584*

**KOPARRØR**
Koparrør: longd 5,5 m, diam. 35 mm, 12 mm og 4mm
*Tlf. 313484 219584*

**KARUBONKUR**
Bonkur við einum føstum karða til sølu.
*Tlf. 313484 219584*

**ÚTITRAPPA**
Tú fært hana ókeypis um tú kemur eftir henni. Hon er sundurtikin.
*Tlf. 317554*

**ARGJAVEITSLA 2005**
verður leygardagin 29. okt. kl. 19.00. Tekning hjá Johild Dulavík 315779/515778. Fróði Olsen 311299/214981. Síðsta freist er 24.okt. Avmarka atgongd.
*Argja Bóltfelag/Argja Róðrarfelag*

**TIL SØLU**
2 dekoratiónsplantur, kunstigar. Hædd: umleið 180 cm. til sølu.
*Tlf. 503249*

**GLASDISKUR**
til handil/kiosk, 3 hæddir av glashillum, hædd 120 cm. dýpd 45 cm. br. 75 cm.
*Tlf. 503249*

**ER TAÐ NAKAR**
sum hevur ein motor til eina bindimaskinu at selja mær? Vinarliga ring á
*tlf. 216347*

**VEKTSTONG TIL SØLU**
og 2 stk. 15 kg. vektir. 2 stk. 10 kg. vektir. 2 stk. 5 kg. vektir. Vektirnar eru úr gummi. Nýprísur 3.000,- Til sølu fyri 800,-
*Tlf. 214166*

**RADIOAMATØRST. TIL SØLU**
við mastur/antennu og lykil. Í góðum standi.
*Tlf. 315376 millum kl. 10-18*

**KOSMETOLOGÚTGERÐ TIL SØLU**
so sum: Tezla, voksvarig rulliborð og eitt magic peeling apparat við roterandi bustum, skin tonic spray o.a.
*Tlf. 284300*

**SOLARIUM TIL SØLU**
2 stk. Ultrasun í góðum standi bíliga til sølu.
*Tlf. 264314*

**PLASTVINDEYGA**
stødd 50x50 cm. Kann latast upp. Prísur kr. 500,-
*Tlf. 514029*

**GRINDAKNÍVUR TIL SØLU**
ein grindaknívur normal stødd og ein lítil grindaknívur til sølu.
*Tlf. 251863*

**CONSOL SÓL, NIELS FINSENSGØTA 25**
Sera góður massagustólur, 20 kr. fyri 10 min. Sól 20 kr. fyri 8 min.

**ÁRSVEITSLAN**
hjá Tórshavnar og Kollafjarðar Bátafeløgum verður tann 12. nov. 2005 kl. 19.00 í bygdarhúsinum í Kollafirði.Bussur koyrir ókeypis úr Vágsbotni kl.18.30. Atgongumerki keypast í Kunningarstovuni í Havn og íKjalnesbúðini.
*Tórshavnar og Kollafjarðar Bátafeløg*

**PENNAR TIL SØLU**
Reklamupennar til sølu.
*Tlf. 226689*

**EITT NÝGJØRT**
sera snotuligt hús við høgari reising, mát 5 x 2.20 til sølu.
*Tlf. 222326*

i Sosialurin